1976 40 2016

# Posta Stamps
## Føroyar

Nr. 27
Februar 2016

ISSN 1603-0036




**Nýggjar frímerkjaútgávur:**

- Postverk Føroya 40 ár
- Nólsoyar Páll 250 ár
- Norðurlandaútgáva 2016: Hjallurin
- Europa 2016: Grøn orka

Posta
FAROE ISLANDS







FO 828




FO 828-829

Royndarprent

# Postverk Føroya 40 ár

## Tá postkassarnir skiftu lit

Sjónin er í roynd og veru eitt rættuliga margháttligt fyribrigdi. Umframt ta sjálvsøgdu upp-gávuna, at síggja umhvørvið og leiða okkum nøkulunda snikkaleys gjøgnum gerandisdagin, hevur hon eisini eitt slag av skrásetandi funktión, at senda ótilvitaða kunning frá eyganum til tann partin av heilanum, ið tekur sær av heildarmyndini. Vit varnast, uttan at hyggja beinleiðis eftir, so brátt onkur lítil broyting er farin fram í kendum umhvørvi. Tað er helst ein fyrndargamal og íborin verndarháttur vit hava: "Verð varin, alt er ikki sum tað plagar!"

Tað var ein sovorðin uppliving eg fekk ein dagin í 1976, ávegis inn til keypmannin í grannalagnum. Í visuellu heildarmyndini, var okkurt, ið ikki ruggaði rætt, men í løtuni kundi eg ikki seta fingurin á hvat tað var. Ikki fyrr enn eg skuldi lata dyrnar upp, varnaðist eg broytingina:

Tann vakri reyði postkassin frá danska postverkinum, ið annars hekk við dyrnar, var burtur. Í staðin hekk nú ein postkassi av sama slag og skapi – men hann var bláur og prýddur við einum stiliseraðum veðrahorni og áskriftini: Postverk Føroya.

Næstu dagarnir sá eg postkassar allastaðni – men brátt vandi heilin seg við ta sannroynd, at sjálvandi eru postkassar bláir – og orðatilfeingið varð víðkað við hugtakinum "postblátt."

Seinni komu fleiri broytingar í gøtumyndini. Teir eyðkendu gulu Renault 4 postbilarnir hvurvu og vórðu avloystir av smáum og størri blámálaðum vøruvognum. Enntá ein tann mest eyðkenda og ikoniska ímyndin hjá danska postverkinum – postmaðurin í kaskett og blóðreyðum jakka, endaði sum ein nostalgisk minnismynd. Í staðin fingu vit postboð í meira tíðarhóskandi búna, bláir og svartir jakkar við endurskini á ermuni.

Jú, mangt broyttist í 1976 – og orsøkin lá eini tvey ár frammanundan. Eftir løgtingsvalið í 1974, gingu Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin saman í samgongu. Ein partur av samgonguskjalinum var at yvirtaka stovnar riknir av ríkinum, m.a. postverkið og leggja tað undir heimastýrið. Samráðingar byrjaðu í 1975 og tann 1. apríl 1976 varð før-oyska deildin av danska postverkinum yvirtikin av Føroya Landsstýri. Nýggi stovnurin fekk heit-






Skift var frá reyðum til blátt. Nøkur av reyðu donsku postskeltunum hingu uppi eina tíð aftaná yvirtøkuna.

Posthúsið í miðbýnum 31. mars 1976 um kvøldið. A.G. Nielsen tekur Dannebrog niður fyri seinastu ferð

ið Postverk Føroya og danska signaltrompetin á búmerkinum varð skift út við eitt veðrahorn.

Við yvirtøkuni vórðu tvær nýggjar deildir lagdar afturat vanliga postflutningsvirkseminum. Ein postgirodeild og so tað, ið filatelistar og frímerkjasavnarar um allan heim eftirhondini kenna so væl, nevniliga frímerkjadeildin.

Longu tann 30. januar 1975 sendi táverandi danska postverkið fyrstu føroysku frímerkini á marknaðin, saman við føroysku deildini. Og á sjálvum yvirtøkudegnum, tann 1. apríl 1976, gav nýstovnaða føroyska frímerkjadeildin út tey fyrstu reint føroysku frímerkini. Evnisvalið var Merkið, ein bátur í neysti og eitt gamalt føroyskt postboð. Síðan hevur gingið slag í slag við teimum smáu perforeraðu myndunum úr føroyska alheim-inum – og hesi bæði minnisfrímerkini hava raðnummar FO 828 og 829.

Føroyska frímerkjaútgávan hevur havt sína, ikki heilt eiðasøru ávirkan á samfelagið. Fyri ein part orsakað av útflutningsinntøkum – og, ikki minst, við at breiða kunning og vitan um okkara lítla oyggjaland víða út í heim.

Nógv er broytt síðan sjeytiárini. Menningin hevur gingið skjótt fyri seg og hevur ført mangar broytingar við sær. Gamla Postverk Føroya varð í 2005 umskipað til eitt sjálvsognar partafelag og í 2009 fekk felagið nýtt navn og nýtt búmerki. Partafelagið eitur nú stutt og greitt, Posta, og nógv av tí siðbundna virkseminum er umlagt ella lagað til menningina. Men frímerkjaútgávurnar halda fram sum vanligt, og tað er tykkum, ið savna føroysk frímerki, fyri at takka, umframt teimum einstaklingum og fyritøkum, sum frankerað síni brøv við føroyskum frímerkjum.

Tillukku Posta við teimum 40 árunum. Søgan hevur verið marglitt og áhugaverd – og handan í morgin bíðar framtíðin og enn fleiri ársdagar.

*Anker Eli Petersen*







FO 830 Royndarprent

# Nólsoyar Páll 250 ár

## Poul Poulsen Nolsøe 1766 - 1809

**Hvat skapar eina tjóðarhetju?**

Hesi hálvavegna mýtisku fólkini ið brenna sítt navn í tjóðartilvitskuna og tykjast óbundin av skiftandi tíðaranda og politiskum ráki.

Spyrt tú ein føroying hvør tjóðarhetjan í okkara lítla oyggjalandi man vera, er svarið oftast stutt og greitt: Nólsoyar Páll.

Og orsøkin er sum ein vinningur í happadráttinum. Hann var rætti maðurin í røttu løtuni, vitugur, stríðssinnaður og treiskur. Harafturat kemur so tann paradoksala sannroyndin, at heimssjón hansara, hugskot og framferð var sera óføroysk – í hvussu so er sæð við samtíðar eygum.

**Út í heim**

Poul Poulsen Nolsøe varð føddur í 1766. Árið eftir legði danski stórkeypmaðurin, Niels Ryberg, eina transitgoymslu í Tórshavn, fyri at sleppa undan handilsavmarkingum, ið vóru íkomnar av amerikanska borgarastríðnum og krígnum millum Bretlands og Fraklands. Handilsstøðin hjá Ryberg lat dyrnar til umheimin upp í einum samfelag, sum, stórt sæð, hevði staðið í stað síðan miðøld – fullkomiliga í valdinum hjá einum einahandli, sum forðaði fyri vanligari samfelagsmenning. Í 20 ár stevndu skip úr øllum heimspørtum til Føroya – og tað kom til at ávirka samfelagið í stóran mun. Brádliga fingu fólk møguleikan at takast við annað enn einfaldan landbúnað, útróður, fuglaveiðu og grindadráp.

Tað var í hesum stutta glotta av broyting, at Nólsoyar Páll vaks upp. Hann fekk góða skúling, lærdi navigatión og fór til skips. Eftir at hava siglt eini tvey ár á rutuni millum Føroya og Danmarkar, fór hann víðari og sigldi nøkur ár úti í heimi, m. a. sum yvirmaður á donskum og amerikonskum skipum.

Í 1798 kom Nólsoyar Páll afturíaftur. Hann sigldi nú sum stýrimaður og skipari á farmaskipum hjá einahandlinum. Hann giftist, fekk eina dóttur, men unga kona hansara doyði eftir stuttari tíð. Árið eftir giftist hann uppaftur og gjørdist bóndi á Biskupsstøð á Borðoynni. Um hetta mundið var Ryberg-tíðin av og Føroyar sukku spakuliga aftur til støðuna fyri 1767.

**Royndin Fríða**

Tað sigur seg sjálvt, at ein virkisfúsur og víðfarin maður sum Nólsoyar Páll, hevði ilt við at falla til seigliga lívsháttin sum bóndi í einum uppsteðgaðum samfelag. Hann fann brátt saman við samsintum monnum, ið ynsktu fríhandil, frítt at fara til útlendskar marknaðir og frælsi til virksemi og samfelagsmenning.

Saman við tveimum øðrum ynskti Páll at keypa eitt skip til fiskiskap og farmaflutning. Tað eydnaðist teimum tó ikki at fáa lán til keypið, so í staðin keyptu teir í 1804 rovini av



*„Royndin Fríða“.*
*Málningur eftir Hans Skálagarð*
*Mynd: Fotostudio*

einum skipi, ið var farið fyri skeyti í Hvalba. Vrakið varð flutt suður til Vágs og har bygdi Nólsoyar Páll, saman við brøðrunum, eitt lítið skip upp á stutta tíð. Skútan var 14,5 metrar long, 4,4m breið og stakk 2,5 m undir dekkinum.

6. august 1804 fór so fyrsta føroyska skip síðan miðøld av bakkastokki. Tað fekk navnið Royndin Fríða - og longu sama mánað stevndu teir út til royndarfiskiskap undir Føroyum. Frá einari sýningarfrágreiðing frá 1805 vita vit at Royndin Fríða var riggað til sum ein skonnart - og at hon annars, sum tikið verður til, var "eitt meistaraverk"

**Ferðir um hav og stríð við embætisverkið**

Við sjósetingini av Royndini Fríðu, byrjaði eitt ókyrt tíðarskeið við beiskum stríði millum Nólsoyar Páll og samsint øðrumegin og embætisverkið hinumegin. Kongaligi Einahandilin hevði einkarætt at flyta inn neyðsynjarvørur – og til at flyta út vørur, tilskilaðar á einum vørulista.

Í 1805 gjørdi Nólsoyar Páll tvær uttanlandsferðir við Royndini Fríðu. Fyrsta til Bergen við føroyskum koli og onnur til Keypmannahavnar, eisini við koli. Orsakað av innflutningsbanninum høvdu teir ikki farm við sær heimaftur. Sum skilst, var tað á hesi seinnu ferðini, at Nólsoyar Páll megnaði at flyta livandi koppingarevni til Føroya, við snøgt sagt at koppseta manningina, ein fyri og annan eftir á heimferðini.

Árið eftir legði Nólsoyar Páll út á fyrstu veruligu handilsferðina eftir at várfiskiskapurin var liðugur. Hann vildi taka troyggjur, turran fisk og lýsi við sær, eftirsum hesar vørur ikki vóru tilskilaðar á vørulistanum. Men embætismenn í Havn sendu mótmælisskriv til danskar myndugleikar – og hesir bannaðu honum at taka vørur heimaftur við sær. Nólsoyar Páll mótmælti og søkti um loyvi at flyta vørur heim fyri egna rokning. Hann hevði eisini hálvavegna fingið loyvi til tess, men tíðin var knøpp og hann hevði skund fyri at koma heimaftur til summarfiskiskapin. At enda vildi hann ikki bíða longur. Hann keypti vørur, deklareraði tær sum farm til Kristianssand í Noreg og stevndi út á hav. Donsku myndugleikarnir vóru fullgreiðir yvir, at hann hevði givið teimum skeivar upplýsingar, og sendu boð til Føroya um at leggja hald á farmin umborð á Royndini Fríðu. Harafturat varð álagt embætismonnunum í Havn at saksøkja Nólsoyar Páll.



*Modell av garði Nólsoyar Páls í Klaksvík.*
*Ætlanin er at endurbyggja garðin eftir upprunaligu tekningunum*
*Mynd: Fotostudio*

Hetta gjørdist neistin til eina rættuliga margháttliga og drúgva rættargongd. Tað lá illa fyri hjá embætismonnunum at tykjast óheftir og sannførandi, eftirsum teir sjálvir høvdu fløkt seg út í ymiskt smákorrupt virksemi. Harafturat megnaðu teir ikki at prógva at Nólsoyar Páll var smuglari. Sjálvur vildi hann vera við, at farmurin varð umskipaður umborð á eitt svenskt skip úti á opnum havi.

Endin varð at Nolsøe varð dømdur fyri at hava brotið ásetingina um sóttverju. Hann skuldi lata 735 ríkisdálar í bót, fyri at hava selt vørur á opnum havi, men varð fríkendur fyri at hava selt vørur á svarta marknaðinum.

Men myndugleikarnir høvdu ikki hoyrt seinasta orðið frá Nólsoyar Páll hesum viðvíkjandi. Hann var ein framúr táttayrkjari – og veturin 1806 – 07 yrkti hann speiska táttin "Fuglakvæðið", har hann avmyndar mótstøðumenn sínar, embætismenninar, sum grammar ránsfuglar, ið harta og mergsúgva landsins friðarliga fuglastovn.

Í juni 1807 fór Nólsoyar Páll aftur til Keypmannahavnar við einari sendinevnd, ið ætlaði at søkja um eina royndartíð við fríhandli, samráðast um lægri prísir og betri umstøður.

Hetta var eitt ófriðarligt tíðarskeið. Kríggið millum Fraklands og Bretlands var aftur brostið á, og óhefta støðan hjá Danmark var undir trýsti. Fríðrikur krúnprinsur (seinni Fríðrikur VI), ið stýrdi landinum vegna faðir sín, ið var sinnissjúkur, helt tí til í Kiel í Holsteini. Teir fýra føroysku umboðsmenninir fóru tí til Kiel at leggja síni bønarbræv fram.

Fríðrikur krúnprinsur var munandi blíðari enn handilsráðstovan og rentukamarið. Hann gav boð um at lata føroyingunum vørurnar aftur, sum stovnarnir høvdu lagt hald á og skipa fyri, at Royndin fekk farm heim aftur við sær.

Tað gekk altso upp á stás hjá Nólsoyar Páll og sendinevndini. Men tíðin rann undan teimum. Kreppan millum Danmarkar og Bretlands gjørdist alsamt verri – og í juli sendu bretar stór flota- og hermannalið inn í Eystrasalt, fyri at noyða danir at geva danska flotan yvir – eftirsum vandi var fyri, at hesin skuldi enda í klónum á Napoleon. Hóast samráðingar, var endin, at bretar settu herdeildir í land, kringsettu Keypmannahavn og fóru undir at bumba býin við kanónum og rakettum, til myndugleikarnir góvu seg yvir og lótu bretum samlaða danska herflotan.

Hendan eyðmýkjandi viðferðin førdi við sær, at Danmark fór í part við Fraklandi í krígnum – og tað skuldi fáa lagnutungar avleiðingar fyri Føroyar.

Eftir kapitulasjónina, fekk Nólsoyar Páll loyvi frá bretska admirálinum at sigla heim aftur til Føroya við fullum farmi av korni. Royndin Fríða kom heim fyrst í oktober og skipaði kornið upp í Suðuroy.



*Nólsoyar Páll.*
*Standmynd eftir Hans Paula Olsen*
*Mynd: Ingi Sørensen*

Nú gingu níggju mánaðir til næsta skip kom við korni. Støðan í Føroyum versnaði í stórum, kapraraskip herjaðu og løgdu eftir donskum farmaskipum.

Men hóast eyðsýnda neyð í landinum, sýtti Løbner kommandørur framvegis Royndini Fríðu at sigla við farmi. Hann vildi tó hava Nólsoyar Páll at sigla til Noregs ella Danmarkar við boðum úr Føroyum. Fyrst í 1808 høvdu tvey bretsk kapraraskip herjað í Føroyum – og Løbner kommandantur hevði verið noyddur til at yvirgeva garnisónina uttan bardaga. Bygningarnir á Skansanum vóru brendir í grund og vørugoymslurnar hjá einahandlinum vórðu rændar.

Hungursneyð stóð fyri durum – og hetta fekk Nólsoyar Páll at taka sakina í egnar hendur. Seinast í juni sigldi hann til Keypmannahavnar eftir korni. Men í Skagerakk varð Royndin Fríða tikin av einum kapraraskipi og manningin flutt til Gøteborg í Svøríki. Eftir hvat skilst, hevði Royndin Fríða fingið so stóran skaða, at hon ikki longur var sjófør.

Tað eydnaðist tó Nólsoyar Páll at fáa samband við tveir bretskar admirálar og siga teimum frá syndarligu støðuni í Føroyum. Føroyska manningin varð tí send til London fyri at greiða frá teimum óhepnu avleiðingunum av krígnum.

Hjálptir av danska konsulinum í London, fekk Páll samband við bretskar myndugleikar og gjørt teimum greitt hvussu illa stóð til í Føroyum, orsakað av bretsku blokaduni og herjandi kapraraskipum. Bæði Privy Council og handilsmálaráðið vóru fyrikomandi. Nólsoyar Páll fekk nýtt skip, "North Star", sum endurgjald fyri Royndina Fríðu – og ein farm av neyðsynjarvørum til fólkið í Føroyum.

Í desember 1808 ella januar 1809 fór North Star úr Onglandi við neyðsynjarvørum, men kom aldrin leiðina fram til Føroya. Allarhelst gekk skipið burtur í einari ódn ið herjaði bretsku oyggjarnar um tað mundið.

Beiska stríð Nólsoyar Páls mótvegis forstokkaða embætismannaveldinum – og royndirnar at hjálpa landsmonnum í svárari neyð, skapti pínslarváttin og tjóðarhetjuna Nólsoyar Páll. Ein uppiborin heiður – hann var ein óvanligur maður og framsíggin út yvir tað vanliga – og hevði evni og vilja at fremja síni átøk, hóast beiska mótgongd og harða mótstøðu.

*Anker Eli Petersen*







FO 831 Royndarprent

# Norðurlandaútgáva 2016: Hjallurin

## Føroyskur siðbundin matur

Felags norðurlendska frímerkjaútgávan í ár hevur norðurlendskan mat sum høvuðsevni. Føroyska íkastið vísir nakrar av teimum siðbundnu føroysku rávørunum, goymdar í einum føroyskum hjalli.

Hjallurin er føroyska avbrigdið av matkovanum, eyðkendur av rimaveggjunum, ið lata luftina streyma ígjøgnum alt árið. Hjallurin verður brúktur bæði sum matvørugoymsla og sum ramman um ymsar konserveringshættir, sum t.d. at salta, ræsa ella turka mat.

Hetta at Føroyar liggja miðskeiðis í Norðuratlantshavi, hevur altíð havt avgerandi týdning fyri hvussu matur kundi goymast – og harvið eisini føroyskar matsiðir. Landslagið við ongum trøum hevur, sum øldirnar liðu, ikki verið nakað serliga gott grundarlag fyri framkomnum landbúnaði.

At dyrka korn var torført – og eftir hvat skilst, var misvøkstur uml. triðja hvørt ár. Føroyar hevur altíð haft fyri neyðini at innflyta eina ávísa mongd av korni, og í fyrru helvt av 20. øld, góvust føroyingar heilt at velta korn.

Frá fyrst í 19. øld komu eplini til Føroya og siðurin at velta epli breiddi seg so við og við um alt landið. Saman við ymsum rótakáli og innfluttum korni, gjørdust eplini sostatt grundarlagið í føroyskari matgerð.

Vinstrumegin á frímerkinum hanga fýra harur til búningar. Haran er einasta landsúgdjór, ið føroyingar veiða. Haran varð innflutt mitt í 19. øld, júst við veiðu fyri eyga – og finst nú á flestu oyggjunum. Haran leggur tríggjar ferðir um árið – og tað ger hana vælegnaða sum veiðidjór. Mett verður at uml. 7.000 harur verða skotnar hvørt ár.

Við síðuna av harunum hanga fýra grindalykkjur – hongdar upp at turka. Grindahvalurin hevur altíð havt ein avgerandi týdning sum kjøtískoyti í Føroyum. Grind verður etin fesk, saltað, røst ella turr. Feskt tvøst og spik verður kókað - sama við ræstari grind og saltgrind. Turkaðu lykkjurnar á myndini verða etnar saman við turr- ella lakasaltaðum spiki.

Við síðuna av grindalykkjunum, hanga tvær greipur av røstum ella turrum fiski. Tveir fiskar verða greipaðir saman og hongdir at turka. Fyrstu tíðina búnast fiskurin og ræstnar – og fær sín eyðkenda sterka smakk. Tá fiskurin er ræstur, verður hann borðreiddur kókaður. Afturvið hevur man turr- ella lakasaltað spik, speril ella garnatálg. Garnatálg verður gjørd úr garnmørinum, ið hevur ligið og ræsað. Tá



Í hjallinum
Mynd: Fotostudio

ein tíð er fráliðin, verður garnmørurin malin. Úrslitið er ein sera sterk tálg, ið verður smeltað saman við smøri ella margarini og stoytt yvir ræsta fiskin og eplini.

Um fiskurin verður hangandi enn longur, tornar hann. Turrur fiskur er sera harður og skal bukast moyrur, áðrenn hann kann etast. Afturvið turrum fiski etur man vanliga turr- ella lakasaltað spik, smør ella epli.

Føroysk matgerð er eyðkend við at alt skal brúkast. Tí hanga eisini mørar í hjallinum.

Mørurin er gøgnini í nýfletta seyðinum, lungu, hjarta og livur og er vanligur heystarmatur – saman við avroðum annars. Vit skulu ikki koma inn á allar teir verðar, ið kunnu gerast úr hesum rávørum, bara nevna tveir.

Tálgalivur er livur, fylt við tálg, ofta eisini við leyki og pipari. Blóðmørur er blóðpylsa við sveita, mjøli, tálg og rosinum, fylt í indur seymað úr reinsaðari vomb. Tálg og vomb eru í fatinum, mitt á myndini.

Eitt annað dømi um hetta at nýta alt til fulnar, eru toskarhøvdini, beint yvir fatinum. Er fiskurin nóg stórur, eru høvdini frálíkur matur.

Tey kunnu eisini skerast út til kjálkar, ið verða kókaðir ella stoktir - bæði feskir og saltaðir. Harafturat kann man skera lippur úr høvdinum, ið fáast burturúr tunguni og feita fiskinum undir høkuni.

Við síðuna av mørinum hanga lomvigar. Sjófuglur av ymsum slag hevur altíð verið ein partur av føroyskari matgerð. Lomvigi, álka, lundi ella havhestur eru vanligastu matfuglarnir – og í Mykinesi er eisini vanligt at veiða súlu.

Atgongdin til sjófugl er tó avmarkað og reglurnar fyri friðing av fugli eru sera strangar.

Tá seyðurin verður flettur um heystið, verða krovini hongd upp at turka. Fyrstu tíðina gongur ein ávís ræsing fyri seg, júst sum við fiskinum - og turkingin gongur fyri seg í trimum stigum.

Fyri jól er kjøtið ræst og hevur ein eyðkendan sterkan smakk. Ræst kjøt er lystimeti og veitslumatur og verður stokt ella kókað. Tá kjøtið verður kókað, fæst ein frálík røst súpan burturúr.

Tá kjøtið hevur hingið einar tveir mánaðir afturat, er kjøtið turt og kann etast sum tað er. Turt seyðakjøt verður nýtt sum viðskeri til rug-



Gamal hjallur í Svínoy
Mynd: Maud C. á Geilini

breyð ella føroyskan drýl. Meginparturin av kjøtinum verður etið turt – men um tað hongur eitt heilt ár, verður tað skerpikjøt. Skerpikjøt er turrari og harðari enn vanligt turt kjøt.

Hesi trý turkingarstigini: ræst kjøt, turt kjøt og skerpikjøt, verða av fólki flest roknað sum besta lystimeti í føroyskari matgerð.

Seinastu árini eru gjørdar ymsar royndir við siðbundnu føroysku rávørunum og fleiri og fjølbroyttari hættir at borðreiða eru komnir undan kavi.

Stjørnukokkar hava roynt seg fram og sett matin saman á annan hátt og saman við rávørum, ið ikki vanliga teljast sum serføroyskar. Tað hevur ført til eitt stórt úrval av nýggjum rættum, sum enntá verða virðismettir av øðrum enn føroyingum.

Serliga matstovan Koks í Havn, er kend fyri nýhugsan og sítt stóra úrval av lystimeti úr føroyskum rávørum, feskum, ræstum og turrum.

Her skal leggjast afturat, at hesar ræstu og turkaðu matvørurnar einans kunnu framleiðast orsakað av høgu og søltu luftvætuni í Føroyum, sum forðar fyri at rot kemur í matin.

Seinastu árini eru royndir framdar við at turka danska svínaskinku og ost – og hesar royndir hava fyri tað mesta verið væleydnaðar.

*Anker Eli Petersen*












FO 832-833

Royndarprent

# Europa 2016: Grøn orka - varandi orka

**Varandi orka**

Nógv verður tosað um varandi orku í hesum døgum. Tilfeingið av steinrunnum orkukeldum í heiminum er avmarkað. Olju- og kolfýrd orkuverk elva í alt ov stóran mun til samlaðu $CO_2$ dálkingina, sum longu nú hevur ávirkað veðurlagið á jørðini so mikið, at negativ árin kennast. Harafturat kemur so tann óhugnaliga sannroyndin, at Murphysa lóg um, at "tað, ið kann ganga galið, gongur galið," ferð eftir ferð ger seg galdandi viðvíkjandi teimum annars so effektivu kjarnorkuverkunum.

Í Føroyum var tað landslagið, tær brøttu líðirnar og nógva regnið, ið gjørdi at man, longu frá byrjan, fór at takast við varandi orku.

**Undangongumaðurin**

Longu í 1907 royndi bóndin og handilsmaðurin Ólavur á Heygum at fáa eitt vatnorkuverk til heimbygdina Vestmanna. Hansara hugskot var at byrgja upp fyri brøttu Fossá – og leiða vatnið oman til eina turbinu niðri við sjóvarmálan. Ólavur fór undir at gera eina einfalda byrging í ánni, men væntandi áhugi og fígging førdu til at hann noyddist at gevast við arbeiðinum. Hann royndi til deyða sín í 1923 vinna stuðul fyri sínum ætlanum, men politiskt kegl og persónligur húsagangur orsakað av idealistiska tiltakinum, sparkaðu beinini undan hesum undangongumanni.

**Í Botni**

Í staðin varð tað eitt framskygt samtak millum bygdaráðið í Vági og handilsmenn á staðnum, ið bygdu fyrsta vatnorkuverkið í Føroyum. Við at byrgja upp fyri tvey vøtn í fjøllunum norðanfyri bygdina og leiða vatnið í rørum oman til eina turbinu niðri í Botni vestanfyri, fingu vágbingar eitt vælvirkandi orkuverk, ið, sum fráleið, megnaði at framleiða streym til alla oynna. Vatnorkuverkið í Botni varð tikið í nýtslu í 1921 og virkar framvegis.

Sama ár sum vatnorkuverkið í Botni fór at framleiða streym, varð eitt maskinorkuverk bygt í Havn, har umstøðurnar fyri einum vatnorkuverki ikki vóru til staðar. Í 1931 byrjaði vatnorkuverkið Norðuri við Strond at framleiða streym til Klaksvíkar.

Komandi árini vóru smá og størri vatn- og maskinorkuverk bygd kring landið – men ikki fyrr enn eftir annan heimsbardaga, kom gongd á veruliga samskipan av framleiðsluni av el-orku.



Vindmyllulundin hjá SEV í Húsahaga
Mynd: SEV

## SEV

Í 1946 gingu 19 kommunur í Streymoy, Eysturoy og Vágum saman í eitt elfelag ið fekk navnið SEV. Endamál felagsins var at samskipa og fíggja felags tiltøk viðvíkjandi framleiðslu av elorku – og í 1951 fór felagið undir eina størri verkætlan at byggja eitt stórt vatnorkuverk við Fossá í Vestmanna. Júst sum Ólavur á Heygum hevði droymt um nærum hálva øld frammanundan. Byrgingar vórðu bygdar uppi millum fjalla og vatnið leitt í rørum oman til orkuverkið við Fossá. Tann 5. mai 1954 varð Fossáverkið tikið í nýtslu og komandi árini, fram til 1963, vórðu tvey orkuverk afturat bygd við Vestmanna.

Sama ár, í 1963, varð øll el-framleiðsla í landinum løgd undir SEV, sum harvið yvirtók øll tey smærri orkuverkini runt um landið. Elnetið varð útbygt og bøtt um og onkur av smærru maskinorkuverkunum vórðu løgd niður.

### Sundsverkið

Í sekstiárunum vaks orkutørvurin í Føroyum áhaldandi, serliga í meginøkinum. Avgerð varð tí tikin um at byggja eitt orkuverk rikið av tungolju á Sundi norðan fyri Havnina. Í 1975 vórðu báðir motorarnir á Sundsverkinum tiknir í nýtslu. Síðst í sjeyti- og fyrst í áttatiárunum, varð verkið útbygt og hevur nú fimm motorar. Sundsverkið var upprunaliga ætlað sum backup – og hevur orku til at leiða streym út til alt landið, um øll hini verkini av einhvørjari orsøk skuldu steðgað upp.

### Vatnorkuverkið á Eiði

Men longu innan Sundsverkið var liðugt, varð greitt, at raksturin fór at vera dýrari enn ætlað. Oljukreppurnar fyrst og síðst í sjeytiárunum, gjørdu at fólk av álvara fingu eyguni upp fyri varandi orku. Avgerð varð tí tikin um at útbyggja vatnorkuna í stórum – hesaferð í samband við stóru vatngoymsluna í Eiðisvatni.

Átakið fevndi um bygging av einum orkuverki og eini byrging fyri at økja um kapasitetin í Eiðisvatni. Harafturat vóru so, í fleiri umførum, tunlar boraðir til áir í Eysturoy. Fyrsta turbinan í Eiðisverkinum varð tikin í nýtslu í 1987 – og í 2014 stóð orkuverkið endaliga liðugt við trimum sterkum turbinum.

### Vindorka

Longu í sjeytiárunum framdu einstaklingar royndir við vindorku í Føroyum. So løgið tað kann tykjast, so er vindorka rættuliga tvørlig at fáast við her á landi, har vindur annars ikki trýtur. Orsøkin liggur í skiftandi vindi – frá



loti til ódn – umframt tær ógvusligu hvirlurnar ið standast av landslagnum. Tað skulu tí rættuliga harðbalnar myllur og útjavnandi tøkni til fyri at standa seg í umhvørvinum.

Í 1993 setti SEV eina vindmyllu upp í Neshaga í Eysturoy. Í 2003 skrivaði felagið undir sáttmála við partafelagið Røkt um keyp av elorkuni frá trimum vindmyllum við Vestmanna.

Tvey ár seinni, í 2005, setti SEV tríggjar vindmyllur upp í Neshaga. Myllurnar vóru risastórar og sóust langa leið – og staðið fekk tí sjálvandi eyknevnið "Golgata" millum manna. Í einari ódn veturin 2011/12, brotnaðu tvær av myllunum. Triðja myllan varð tikin niður og í staðin setti SEV tvær nýggjar vindmyllur á staðnum - og tríggjar afturat suður móti Eystnesi. Hesar nýggju myllurnar eru útgjørdar við tøkni, ið tolir ógvusligan vind - og kunna framleiða streym í vindmegi heilt upp til 34 sekundmetrar.

**Húsahagi**

Í 2014 varð so enn størri kapasitetur lagdur afturat vindorkusíðuni, tá ið SEV tók myllulundina Húshagi í nýtslu. Lundin hevur 13 stórar vindmyllur. Harafturat verða royndir gjørdar við battarígoymslu, ið skal útjavna ójavna í vindorkuframleiðsluni.

Tøknifrøðilig framstig seinastu árini hava ført við sær at vindorkan kann fylla meira í orkuframleiðsluni enn higartil.

**100%**

Í 2015 fór varandi orka, vind- og vatnorka, upp um tey 60% av samlaðu orkuframleiðsluni í Føroyum – meðan restin – uml. 40% stavaði frá oljuriknari orku. Í einari kanning frá 2014, av orkuframleiðsluni í londum ið ikki hava náttúrligar orkukeldur (t.d. Ísland, ið kann framleiða streym úr heitum keldum), lá Danmark ovast við einari grønari orkuframleiðslu upp á 40%, so Týsklandi við 30%. Føroyar, ið ikki vóru við í kanningini, høvdu sama ár eina vind- og vatnorkuframleiðslu upp á 51%. Altso munandi hægri enn Danmark og Týskland. Og bara eitt ár seinni vóru 10% løgd afturat framleiðsluni.

Sambært SEV er málið, at framleiðslan av varandi orku í Føroyum skal vera 100% í 2030.

*Anker Eli Petersen*




Frá vinstru:
Gyðja Johannesen, Edvard Heen, Svanbjørg Manai

# Jólamerkjagrunnurin letur Barnaheiminum 330.000 kr.

Jólamerkjagrunnurin hevur til endamáls at býta út ágóðan av søluni av jólamerkjum, ið Posta gevur út á hvørjum ári. Grunnurin stuðlar samfelagsgagnligum verkætlanum fyri børn og ung. Í 2015 hevur Barnaheimið fingið stuðul áljóðandi kr. 330.000.

Hvørja ferð tú keypir jólamerki frá Posta, fer vinningurin til Jólamerkjagrunnin, sum letur stuðul til verkætlanir fyri børn og ung.

Grundgevingin fyri at lata Barnaheiminum stuðulin er, at Jólamerkjagrunnurin vil seta sjóneykuna á børn, ið ikki hava eina sterka rødd í samfelagnum. Somuleiðis verður megnararbeiðið, sum Barnaheimið fremur, viðurkent. Grunnurin ásannar eisini, at fíggjarligu karmarnir hjá Barnaheiminum geva ikki rúm fyri stórvegis upplivingum, sum liggja uttanfyri Barnaheimið. Fyri børn hava upplivingar stóran týdning fyri trivnað og menning. Í grannalondum okkara er vanligt, at stovnar av hesum slagi fara uttanlands tvær ferðir um árið, tí tað er mennandi hjá børnunum at koma út úr sínum vanliga umhvørvi.

Í Føroyum hevur Barnaheimið ikki so stórt rásarúm at skipa fyri uttanlandsferðum. Tískil er gjørt av at marka stuðulin til eina skíferð til Noregs í mars 2016. Á Barnaheiminum húsast í dag umleið 20 børn.

Jólamerkjagrunnurin ynskir børnum og starvsfólkum á Barnaheiminum eina góða skíferð.

Í Jólamerkjagrunninum eru:

Joel undir Leitinum, formaður
Edvard Heen, nevndarlimur
Fróði Joensen, nevndarlimur



*Jólamerkini 2015*
*Listafólk: Edward Fuglø*

# Westerbeek 1742

Í samband við útgávuna “Westerbeek” varð ein framløga hildin á sjóvinnusavninum í Rotterdam tann 19. februar, har m.a. eftirkomarar eftir manningina á Westerbeek vórðu innbodnir – bæði úr Føroyum og úr Hálandi. Umframt frímerkini, var eisini ein serbjálvi og eitt serstempul gjørt til framløguna. Ein snøgg mappa við frímerkjum og fyrstadagsbjálva fæst eisini til keyps.

Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum og á www.stamps.fo







Serbjálvi v/frímerkjum og serstempli "Maritiem Museum"










Westerbeekmappa v/fyrstadagsbjálva, smáarki og frímerkjum

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 1. apríl, 26. apríl og 9. mai 2016



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postverk Føroya í 40 ár** |
| Útgávudagur: | 01.04.2016 |
| Virði: | 9,00 og 17,00 kr. |
| Nummur: | FO 828-829 |
| Frímerkjastødd: | 34,7 x 46,33 mm |
| Stødd, ark: | 86 x 84 mm |
| Snið: | Posta |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og smábrøv til Evropa, 0-50 g. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Nólsoyar Páll 250 ár** |
| Útgávudagur: | 26.04.2016 |
| Virði: | 24,00 kr. |
| Nummur: | FO 830 |
| Frímerkjastødd: | 31 x 43 mm |
| Málningur: | Archibald Black |
| Gravering: | Martin Mörck |
| Prenthháttur: | Offsett/graverað |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Miðalbrøv til Evropa, 51-100 g, |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Norðurlandaútgáva 2016: Hjallurin** |
| Útgávudagur: | 26.04.2016 |
| Virði: | 9,00 kr. |
| Nummur: | FO 831 |
| Frímerkjastødd: | 55 x 33 mm |
| Mynd: | Fotostudio |
| Prenthháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, 0-50 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Europa 2016: Grøn orka** * |
| Útgávudagur: | 09.05.2016 |
| Virði: | 9,00 og 17,00 kr. |
| Nummur: | FO 832-833 |
| Frímerkjastødd: | 40 x 26,5 mm |
| Snið: | Edward Fuglø og Doxias Sergidou, Kypern |
| Prenthháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | OeSD, Eysturríki |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og smábrøv til Evropa, 0-50 g. |

* er eisini givið út sum sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum (3 av hvørjum)

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Prentsmiðja: Trykteam, Danmark